Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Føroya Banki í Klaksvík nýggjan leiðara

**- Tað er sunt, at samfelagið ikki tekur búskaparliga framgongd sum eina sjálvfylgu longur. Hinvegin eiga vita at ansa eftir, ikki at loypa slíkan hvøkk á fólk, at ongin hættar sær undir nýtt virksemi, og alt harvið steðgar upp, sigur Hans Petur Clementsen, nú hann tekur við sum nýggjur deildarleiðari í Føroya Banka í Klaksvík**



*Hans Petur Clementsen og Hanus Heinesen.*

LEIPARASKIFTI
*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*

Fríggjadagin var móttøka á deildini hjá Føroya Banka í Klaksvík í sambandi við leiðarskifti. Skiftið hevur millum annað við sær, at bæði farandi leiðarin Hanus Heinesen og nýggi leiðarin Hans Petur Clementsen nú venda aftur til sítt gamla arbeiðspláss.

### Blandaðar kenslur

Nú Hanus Heinesen fer aftur í sítt gamla starv sum varaleiðari á deildini hjá Føroya Banka í Saltangará, bíðar samstundis ein nýggj avbjóðing. Umframt at vera varaleiðari, skal Hanus eisini hava leiðsluna av Vinnulívsdeildini um hendi.

- Vinnudeildin hjá Føroya Banka í Saltangará fevnir um alla Eysturoynna og heilt til Kollafjarðar. Hetta økið hevur eitt sera virkið vinnulív, so hetta verður ein spennandi avbjóðing, sigur Hanus.

Hanus hevur verið leiðari í Føroya Banka í Klaksvík seinastu fimm árini, og hann dylur ikki yvir, at tað er við blandaðum kenslum, at hann nú takkar fyri seg.

- Tá eg kom til Klaksvíkar, kendi eg ongan, hvørki starvsfelagar ella viðskiftafólk. Men eg varð móttikin við opnum ørmum, og tað er ikki minst teimum fyri at takka, at eg havi trivist so væl her norðuri, sigur Hanus.

Á móttøkuni fríggjadagin fekk Hanus handaða eina gávu, sum minnið um tíðina í Klaksvík. Tað var næstformaðurin í Stjørnuni, sum vegna felagið, gav Hanusi eina mynd av Klaksvíkini, har stórur partur av skipaflotanum liggur á Vánni eitt vakurt vetrarkvøld.

Samstundis nýtti næstformaðurin í Stjørnuni høvið til at takka Føroya Banka fyri avbera góðan stuðul og samstarv, við vón um at tað fer at halda fram undir nýggju leiðsluni.



*Næstformaðurin í Stjørnuni handar Hanusi Heinesen gávu frá felagnum*

### Drúgvar royndir

Nýggi leiðarin Hans Petur Clementsen byrjaði sína yrkisleið innan bankaheimin í Føroya Banka í Klaksvík.

- Hetta kennist næstan sum at koma heim, tí eg kenni starvsfólkini væl og eisini stóran part av viðskiftafólkunum, sigur Hans Petur, sum eisini er uppvaksin í Klaksvík.

Hóast Hans Petur er ungur, hevur hann drúgvar royndir innan bankayrkið. Hann hevur starvast innan allar deildir í bankanum, seinast sum varaleiðari á fíggjardeildini í Føroya Banka í Havn. Eitt skifti var hann í starvi hjá Barcley's Bank í London og afturkomin til Føroya, starvaðist hann eitt tíðarskeið á Kaupthing í Havn. Hetta seinasta árið hevur Hans Petur verið leiðari á Føroya Shell í Klaksvík.

### Rætta løtan

Hans Petur er yngsti leiðari, ið hevur verið á deildini í Klaksvík, og tað slepst neyvan undan, at tað fer at merkja arbeiðsumhvørvið í onkran mun.

- Nú ætli eg ikki at kollvelta deildina, men eitt tað fyrsta, eg fari at í holt við, er at gera deildina meir sjónliga. Vit stuðla nógvum feløgum og tiltøkum, men marknaðarføringin her norðuri kundi verið betri, sigur Hans Petur.

Nýggi leiðarin letur seg ikki ræða av spádómunum um ringar tíðir og búskaparliga kreppu.

- Sjálvandi hevði eg døpru búskaparútlitini í huganum, tá eg segði ja til starvið. Men eg gjørdi av, at hetta var júst tann rætta løtan at átaka mær hesa ábyrgdina. Landsbúskapurin er ikki so tryggur, sum hann hevur verið, men talan er ikki um eina bráfeingis landsumfatandi kreppu. Hetta gevur mær tíð og møguleika at meta um, hvønn veg tað gongur og umráða meg, áðrenn avgerðirnar verða tiknar.

Hans Petur ásannar, at alivinnan er í kreppu, men leggur dent á at vit eiga at ansa eftir, ikki at loypa slíkan hvøkk á fólk, at ongin hættar sær undir nýtt virksemi, og alt harvið steðgar upp.

- Tað er lætt at vera leiðari, tá búskapurin blómar, og tú kanst siga ja til alt. Hitt krevur meir, eisini at tú torir at taka minni vælumtóktar avgerðir. Men tað taki eg sum eina avbjóðing, sigur nýggi leiðarin í Føroya Banka í Klaksvík, sum gleðir seg til at fara til arbeiðis saman við sínum gomlu starvsfeløgum.



*Jóhan Páll Joensen, nevndarformaður, Hanus Heinesen, farandi leiðari, Hans Petur Clementsen, nýggjur leiðari og Jørn Astrup Hansen, forstjóri í Føroya Banka*





# Tórsvøllur og Gundadalur – ein nútíðarlig harmasøga

## Nøkur orð til Poul Michelsen

**Ólavur Hátún**



**Góði Poul!**

Í bløðunum í seinastu viku hevur tú eina frágreiðing um gongdina í Tórsvallarmálinum, har fleiri útsagnir biðja um viðmerkingar.

»Vantandi møguleikar hjá kommununi at útvega grundøkir ella kanska stuttskygni gjørdi, at umleið helvtin av økinum« – til frítíðar- og ítróttavirksemi í Gundadali – »bleiv máað burtur til onnur endamál…«. Ikki vóru tað vantandi møguleikar til grundstykki, men heldur tann ikki ókendi korrumperaði hugburður hjá summum av teim ráðandi, ið so harmiliga skerdi møguleikarnar fyri teirra hugsjónum, sum undan fóru. Tíverri mugu vit eisini staðfesta, at tað júst er sama politiska stuttskygni og hugsjónarloysi, sum her í nýggjari tíð hevur latið teg hóreiggja tær í Gundadali, sum tú hevur gjørt til alment ógagn í staðin fyri at vera við til at fremja eina góða søk, sum tú hevði verið tann besti til.

Svimjihøllin á stadionøkinum, bygd fyrst í 80-árunum, var orsøkin til, »at nú trongdist í Gundadali, og at møguleikarnir fyri at menna bæði bóltspæl og frælsan ítrótt í Gundadali gjørdust avmarkaðar …leistin til eina ætlan við fótbólti og frælsum ítrótti var einfalt ov lítil, sum fyrrverandi býararkitektur Gunnar Hoydal gjørdi vart við.«

Gunnar Hoydal kann sjálvur koma fram og ásanna ella avsanna, um hansara leiklutur til støðuna, sum hon nú er í Gundadali, er tann, sum tú vilt leggja hann undir. Gunnar teknaði sjálvur svimjihylin og legði hann í útjaðaran av stadionøkinum sum part av einari heildarætlan, og hann var eisini við inni í myndini, tá heitt varð á tríggjar arkitektastovur í býnum um í felag at gera uppskot til eitt landsstadion í Gundadali. Við teirra ætlan var komið so væl á leið, at býráðið fyri borgaranna pening við spreinging og laging og aðrari fyrireiking hevði gjørt stadionøkið byggibúgvið fyri millum 10 og 20 milliónir krónur. At tú, komin inn í projektið, eins og geykaungi tveitti allar byggilistarmenninar, sum høvdu lagt sál og orku í málið, burtur úr reiðrinum fyri betur at kunna fremja tína einvísu fótbóltsætlan og omaná vart so ósmæðin at festa teirra heitið Tórsvøllur á títt óvandaverk, tað er við til at avmynda teg í hesari harmasøgu.

Altjóða krøv um, at fótbóltsvøllurin mátti breiðkast frá 65 m upp í 68 m, gjørdu, at rennibreytin mátti smalkast til bert at hava 6 breytir, og tí »vóru møguleikarnir fyri semjum ella kompromisum ikki at fáa eyga á«. At kalla øll býarstadion aðrastaðni hava bara seks rennibreytir – soleiðis eisini t.d. Bislett í Oslo, har eg sjálvur havi upplivað øsandi dystarløtur millum fremstu ítróttafólk í heiminum bæði í fótbólti, frælsum ítrótti og í vetrarkappingum. Nú hava norðmenn ætlan um at víðka um á hesum søguliga ítróttastað mitt inni í Oslo býi, har tað er munandi trengri um enn millum Tórsvøll og Ítróttahøllina á Nabb.

Nei, Poul, grundgevingini, at tú vegna plásstrot mátti útihýsa rennibreytini av Tórsvølli, er tað líka so lítið hald í sum so mongum øðrum, tú hevur ført fram um hetta mál. Blaðfest er soleiðis eisini tín upprunaliga grundgeving yvir fyri býaráði og almenningi, at tað skuldi vera fyri at spara pening, at tú fyribils vildi sleppa at seta áskoðarapláss á rennibreytarøkið eystanfyri. Tað skuldi blíva bíligari at taka elementini niðuraftur seinni, bróta burtur stoyptu fundamentini og so byggja uppaftur av nýggjum, enn at skava og spreingja burtur tað sindrið av møl og gróti, sum skuldi givið pláss til eina komandi rennibreyt, og so beinanvegin seta áskoðarapássini á teirra endaliga stað og tá sjálvandi við skýli yvir ella, ið hvussu er, við undirsløgum, sum kundu borið slíkt. Ynski og ætlan hjá tær vóru greið, men framferðargrundgevingin var eitt falsum. At okkara fólkavaldu vóru so naivir, at teir ikki skiltu hetta, hava vit ikki loyvi at trúgva, og her kunnu vit, sum hava ítróttin breiðari í huga enn bara til fótbólt, harmast um, at tað ikki var meira kroppur í táverandi borgarstjóranum enn, at hann soleiðis læt seg putta í tín lumma.

Tú hevur eina longri frágreiðing um, hvussu væl Tórshavnar Býráð og FSF hava gingið saman um hesa fótbóltsætlan í Gundadali. Tað er ikki mín fatan, at bygdafeløgini hava verið so heit fyri at leggja ov stóra fíggjarorku í Gundadal. Og nú tá útlit eru til, at lokalfeløgini kunnu spæla sínar egnu altjóða dystir á heimavølli, man tann áhugin bara vera minkandi. Tín privati grasagarður, sum skuldi verið karmur um eitt yðjandi og mennandi ítróttalív, fer tá at standa enn meira oyðin og tómur, enn hann hevur staðið higartil. Ja, longu í ár sigast bara 2 – tveir! – slíkir dystir at skula fara fram á hesum altjóða fótbóltsstadion.

Sjálvandi ert tú greiður yvir, hvønn veg tað ber, og tað er væl eisini tí, at tú a la Brixtofte leggur á tann bógvin, at nú skal skapast hotell-, banka- og søluvirksemi á okkara einaferð so lovandi fríðtíðar- og ítróttaøki í Gundadali. Men vaknar tú ikki sjálvur frá slíkum dreymum, mugu vit vóna, at okkara býar- og landsumsitingar á mentanarøkinum rakna við og ásanna, at Gundadalur framvegis er besta staðið í Føroyum til fjølbroytt ítróttaligt virksemi og til at kunna hýsa íblásandi altjóða stevnuhaldum sum t.d. Oyggjaleikunum, har vit mest av tínum ávum fyribils eru sett uttanfyri.

Tað munnu vera fáir føroyingar, sum ikki við alstórum áhuga fylgja okkara dúgligu fótbóltsspælarum í teirra dystarleikum við útlendsku stjørnurnar burturi og heima, og eg kenni onki føroyskt ítróttafólk, tað verið sær innan bóltspæl, frælsan ítrótt, kappróður, fimleik ella aðrar greinar, sum ikki ynskja føroyskum fótbólti tær allarbestu umstøður. Men somuleiðis dugi eg illa at hugsa mær, at ikki bróðurparturin av okkara fótbóltsúrmælingum heldur ynskir eitt breitt og fjølbroytt ítróttalív í Føroyum, sum í seinasta enda eisini kemur fótbóltinum til góðar, enn at tað skal vera so, at antin spælir tú fótbólt ella ert tú uttanfyri. Tað munnu somuleiðis neyvan vera nógv sonn ítróttafólk heldur enn onnur fólk, ið síggja ítróttavirksemi í einum breiðari samfelagsligum ljósi enn bert til kappingar, sum eru tær takksom fyri, at tú saman við tínum listinlærda, lógarkøna felaga legði upp ráð um at beina fyri tí góðu ætlanini um eitt veruligt ítróttastadion í Føroyum, og sostatt legði upp til klandur og illstøðu í staðin fyri semju og samanhald um hetta góða mál.




Vika 15, 2004
www.kaupthing.fo

# Framúrskarandi tíðindir úr USA

Seinasta mánaðin hava alheims fíggjarmarknaðir, við alstórum spenningi, bíða eftir, at amerikanska arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin farna fríggjadag aftur skuldi kunngerast. Mótvegis tveimum teimum seinastu frágreiðingunum, gjørdist hendan av sonnum bjørt, tí heili 308.000 arbeiðspláss vóru sett á stovn í USA í mars. Samstundis varð talið fyri februar dagført úr 21.000 í 46.000.

Av tí at vænta varð, at talið fyri mars fór at verða 120.000 og tí at ein bjørt frágreiðing endaliga varð staðfest eftir at tær undanfarnu høvdu verið daprar, ávirkaðust fíggjarmarknaðirnir ógvusligt. Eftir kunngerðina hækkaði danska 2 ára rentan 0,17%-stig meðan 10 ára rentan hækkaði 0,13%-stig. Dollarin styrknaði úr uml. 604 í 614 mótvegis krónuni, og norðurlendsk partabrøv hækkaðu áleið 1,5%.

Bjørtu tølini komu sum kallaði. Hóast greið tekin eru um búskaparligan vøkstur í USA, so hevur amerikanski búskapurin ikki megnað at seta fleiri arbeiðspláss á stovn, m.a. tí at eisini framleidni er økt í seinastuni. Tað er serliga umráðandi at fleiri arbeiðspláss verða sett á stovn, tí hesi skulu til, fyri at tryggja framhaldandi eftirspurning og búskaparvøkstur tá árinini av stimrandi búskapartiltøkunum hjá Bush stjórnini fara at hasa av.

Kaupthing metir at so bjørt tøl kunnu føra við sær, at hýrurin í marknaðunum broytist. Renturnar hækkaðu nógv av frágreiðingini, og væntast kann, at renturákið nú er broytt úr lækkandi til støðugar ella hækkandi rentur. Peningapolitiskt leggur frágreiðingin lunnar undir hægri leiðandi rentur í USA, men Kaupthing metur, at aðrar bjartar frágreiðingar skulu til, áðrenn hetta hendur. Í Evropa fara renturnar ikki at hækka enn, tí meira striltið gongur í búskapunum, samstundis sum róð verður fram ímóti at lækka rentuna í Evropa.

Eftir bjørtu frágreiðingina verður spennandi, nú roknskapir fyri 1. ársfj. fara at verða kunngjørdir. Roknskapirnir fyri 4. ársfj. vóru bjartir og roknast kann við at rákið við bjørtum roknskapum heldur fram. Hesa vikuna kunngerða m.a. Yahoo!, Intel og General Motors.

**Rentur**

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,52% | 0,18% |
| 5 ára lánsbræv | 3,56% | 0,17% |
| 10 ára lánsbræv | 4,25% | 0,14% |

**Partabrævavísitøl**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 263,9 | 0,9% |
| OMX, Svøríki | 715,6 | 3,5% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.746,0 | 2,5% |
| S&P 500, USA | 1.142,0 | 3,1% |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,01 | -4,2% |
| Evru Lánsbrøv | 166,80 | -0,3% |
| Norrøn Partabrøv | 80,80 | 4,1% |
| Altjóða Vøkstur | 64,51 | 1,2% |

**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 615,17 | 0,5% |
| EUR | 744,65 | 0,0% |
| GBP | 1.121,34 | 0,7% |
| NOK | 88,79 | 0,5% |

*Renta og kursir kl 10 ígjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*